Prix Føroyar vinnararnir:

# Vit hava fatur á onkrum



*– At vit fingu 69% frá teimum útlendsku dómarunum sigur mær so mikið sum tað, at vit hava kanska fatur á onkrum, sum fólk uttanfyri Føroyar hava áhuga fyri, sigur Prix Føroyar vinnarin, Knút Háberg Eysturstein, sum saman við bólkin Gestir ognaði sær fyrsta plássið. Her er tað forsangarin Ólavur Hansen.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**– At vit fingu 69% frá teimum útlendsku dómarunum, sigur mær so mikið sum tað, at vit kanska hava fatur á onkrum, sum fólk uttanfyri Føroyar hava áhuga fyri. Nú er nógv hart arbeiði fyri framman, og vit ætla okkum at venja nógv og gera góðan tónleik, sigur Knút Háberg Eysturstein úr eysturoyarbólkinum, Gestir, sum leygarkvøldið vann Prix Føroyar**

VINNARAR 2003
*Ingrid Bjarnastein*

Sum flest øllum kunnugt, so vóru tað Gestir, sum leygardagin kundu standa sum greipuvinnarar av Prix Føroyum 2003. Teir ognaðu sær eitt festivalpláss í Nibe, har Clickhaze var í fjør, og harafturat endaðu teir á ongum minni enn fyrsta plássi í kappingini.

Í innleiðandi umfarinum í Fuglafirði endaðu Gestir sum nummar tvey – aftanfyri Hatespeech, og sum vinnarar av hálvfinaluni tann 8. mars, høvdu gestirnir úr Gøtu ognað sær eitt finalupláss í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið.

Tað var onki »fancy« við framførsluni hjá Gestum. Teir vóru teir. Tónleikurin var í miðdeplinum, og fjeppararnir í reyðum Gestir t-shirts, stóðu sum ein stórur fýrakantaður klumpur beint frammanfyri pallin. Stjørnukastarar høvdu fjeppararnir úr Gøtu eisini við sær, men ongin eldur var á pallinum, og onki konfetti kom dettandi yvir høvdini á fjøldini.

### Væl nøgdir

Spurningurin er sjálvandi býttur, men spyrjast má sjálvandi, hvussu gekst við framførsluni, og hvussu bólkurin er nøgdur við avrikið og úrslitið.

– Vit eru væl nøgdir. Tað gekk væl at spæla, og tað er tað, sum vit eru mest glaðir fyri. Vit fingu eisini undirtøku og stuðul frá áhoyrarunum, sigur Knút Háberg Eysturstein, ljómborðsspælari í Gestum.

– Tað er sjálvandi gott, at tú verður stuðlaður, men tað týdningarmesta er, at fólkið gevur tónleikinum ans og lurtar eftir tónleikinum, og tað gjørdu tey leygarkvøldið.

Finalan gjørdist tøtt leygarkvøldið. Tá alt varð talt saman, vóru tað bara fimm stig, sum skiltu Gestir og Déjá Vu.

– Nú havi eg sæð finaluna í sjónvarpinum, og tað var øgiliga tætt. Déjá Vu vóru knasandi góðir, so tað kundi eins væl verið teir sum vunnu sum vit. Makrel vóru eisini góðir, men eg haldi, at tað var eitt sindur løgið, at stigini vórðu kunngjørd á ein hálvgum pínligan hátt.

Útlendsku dómararnir góvu Gestum heili 69% av sínum atkvøðum, og kann ein róliga siga, at tað er rættiliga nógv.

– 69% frá teimum útlendsku dómarunum sigur okkum, at vit hava kanska fatur á onkrum, sum fólk uttanfyri Føroyar hava áhuga fyri, heldur Knút.

### Føroyskt og egið

Gestir eru ein føroyskur bólkur, og tað ætla teir ikki at broyta nakað uppá. Teir yrkja føroyskt, og hesum ætla teir eisini at halda fram við.

– Vit ætla at halda fram við at yrkja á føroyskum. Tað hoyrir uppí heildina hjá okkum. Vit hava eitt vakurt mál, og tað eiga vit at brúka ístaðin fyri enskt. At yrkja á føroyskum ger tað meira egið enn tað verður á enskum, sigur gesturin úr Gøtu.

Post-prix-rúsurin er nú við at taka av og dagligdagurin byrjar so spakuliga aftur.

– Nú royna vit bara at fáa tað at sodna, og royna at hugsa um, hvat hetta inniber. Vit skulu í studio og til festival, og hetta er sjálvandi stuttligt. Men hetta er eisini ein stór avbjóðing, so nú fara vit at venja nógv og gera góðan tónleik. At vinna prixið er uttan iva eisini ein góð motivatión.

Hetta er aðru ferð á rað, at Prix Føroyar sigurin endar í Gøtu. Hvat eta tit har, sum ikki er at fáa aðrastaðni í landinum?

– Nú veit eg ikki, hvat vit eta, men eg haldi, at tað hevur nakað við tað at gera, at Grót trýr uppá virksemið, sum gongur fyri seg har. Vit venja í venjingarhølunum hjá Grót, og tað gevur nógv at vera við í samtakinum. Eg vil næstan siga, at tað er grundarlagið undir bólkinum, sigur Knút, sum leggur afturat, at tað, at prixið tvær ferðir á rað er endað í Gøtu, er uttan iva eitt herðaklapp til Grót. Hann heldur eisini, at politikkararnir áttu at fingið eyguni upp fyri virkna tónleikalívinum her á landi.

### Aðrar leiðir

Føroysku dómararnir góvu Gestum ein triðing av atkvøðunum. Og hyggjarar og lurtarar kring landið góvu Gestum 34%. Til samanberingar vóru Déjá Vu nógv betur umtóktir millum føroyingar. Teir fingu 58% av føroysku dómaraatkvøðunum, og 48% frá hyggjarum og lurtarum.

– Déjá Vu raka breiðari enn vit gera, men uppá ein annan máta. Vit larma meira, meðan teirra tónleikur er meira reinur og poleraður – uppá ein góðan máta. Onkur eftirlýsti góð løg á prixnum, men eg haldi, at hetta er eitt týðiligt tekin uppá, at tónleikurin í Føroyum gongur aðrar leiðir enn áður, heldur Knút.

Fleiri vilja vera við, at Gestir minnir í so nógv um bretska bólkin Radiohead. Til hetta sigur Knút:

– Radiohead er ein av nógvum bólkum, sum vit lurta eftir. Eg haldi, at í góðum tónleiki, finnur tú eina javnvág millum íblástur frá øðrum og títt egna, har tú leggur tín egna samleika og tína egnu bakgrund í.

Og her noyðast vit aftur at nevna, at Gestir yrkja á føroyskum.

– At vit yrkja á føroyskum, haldi eg er eitt pluss, og nakað, sum dómararnir hava lagt merki til. Hvat hevði Kent verið, um teir ikki yrktu á svenskum. Tað er teirra egna mál, sum ger tað til nakað serligt. Tað sama við Sigur Rós úr Íslandi. Á henda hátt gerst tað spennandi og áhugavert.

### Framtíðin

Vinningurin til vinnaran av Prix Føroyum var ein stórur pakki við blandaðum tónleikaragóðgæti.

Mentamálráðið fíggjar eina viku í Lundgaard Studio í Keypmannhavn, har ungu tónleikararnir fáa høvi at vera gestir í eina viku.

– Framtíðin sær ljós og spennandi út. Vit fara at arbeiða meira við tónleiki, og tað gleða vit okkum til.

Harafturat sleppa teir við í donsku tónleikakappingina, Starfighters, sum kann geva atgongumerki til Skanderborg festivalin.

Umframt hetta, so ognaðu Gestir sær eitt atgongumerki til Nibe festivalin tann 27. juni.

– Vit høvdu ikki væntað, at sloppið við á nakran festival, men vit høvdu sjálvsagt vóna tað. Tað verður eisini stuttligt og spennandi. Vit eru bara nøgdir, sigur Knút Háberg Eysturstein úr Gestum, vinnarabólkinum til Prix Føroyar 2003, at enda.



# Prixið er búgvið at gerast sjálvstøðugt



*Helga Hjørvar heldur, at nýtt samstarv við føroyskar stovnar og fyritøkur kundi staðið fyri næstu Prix Føroyar kappingini um tvey ár. Stig skulu beinanvegin takast til hetta samstarv, heldur stjórin í Norðurlandahúsinum.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**– Prix Føroyar blivið eitt so stór national hending, at Norðurlandahúsið má fáa nýggjar samstarvpartar fyri at menna tiltakið meira, sigur Helga Hjørvar, stjóri í Norðurlandahúsinum. Hon heldur, at føroyskar fyritøkur og tað almenna skulu spæla ein meira virknan leiklut í tiltakinum**

PRIXIÐ
*Eyðun Klakstein*

– Um Prixið var okkara barn, tá ið vit byrjaðu við tí, so er tú nú blivið vaksið, og tíðin er búgvin til, at tiltakið nú verður meira sjálvstøðugt.

Soleiðis sigur stjórin í Norðurlandahúsinum, Helga Hjørvar, nú fimta Prix Føroyar kappingin er av.

– Norðurlandahúsið skal vera uppi í Prix Føroyum á onkran hátt, og til dømis er salurin her í húsinum akkurát tann rætti til finaluna, men eg haldi, at Prixið átti at farið meira yvir á føroyskar hendur nú, heldur Helga Hjørvar.

– Eg vil mæla til, at tað verður gjørt eitt nýtt samstarv, sum skal taka sær av Prix Føroyum framyvir. Við tí haldi eg ikki, at Norðurlandahúsið skal bakka fullkomiliga út úr kappingini, men vit eiga at geva pláss fyri føroyskum initiativi.

### National hending

Stjórin í Norðurlandahúsinum heldur, at møguleikarnir hjá kappingini og bólkunum at fáa enn meira burtur úr, eru góðir.

– Eg trúgvi, at kappingin framvegis kann menna seg nógv, og tað ber til at brúka tíðina ímillum kappingarnar til at promovera bólkarnar uttanlands, sigur Helga Hjørvar.

– Tað finnast nógv góð hugskot um, hvussu arbeiðast kann við føroyskum tónleiki og bólkunum, sum eru við í Prixnum, men Norðurlandahúsið hevur ikki orku til at arbeiða við tí ímillum Prixini.

Norðurlandahúsið brúkar nógvar pengar til Prix Føroyar. Kundu tit hugsa tykkum at sloppið av við Prixið og harvið kunna brúkt pengarnar til onnur tiltøk?

– Nei, tað er ikki tað, sum eg meini. Eg haldi, at pengarnir eru brúktir skilagott, tí øll síggja, hvussu ótrúliga stóran týdning Prix Føroyar hevur fyri tónleikarar og ungfólk í Føroyum. Hetta er ikki ein spurningur um pengar, men hinvegin er Prix Føroyar blivið eitt so stór national hending, at Norðurlandahúsið má fáa nýggjar samstarvspartar framyvir.

### Gera nýtt samstarv

Helga Hjørvar heldur, at tað skal ikki bíðast við at fáa nýggjar samstarvsfelagar upp í Prix Føroyar kappingina.

– Eg haldi, at stig beinanvegin eiga at vera tikin til eitt ella annað samstav, har bólkarnir, sum hava gjørt vart við seg í Prix Føroyum, verða promoveraðir uttanlands. Tað er nógv at gera, tá bólkar skulu av landinum, og tað kostar nógv at ferðast, og Norðurlandahúsið hevur ikki møguleika at standa fyri øllum hesum.

Helga Hjørvar heldur, at nýggja samstarvið millum stovnar og fyritøkur síðani kundi staðið fyri næstu Prix Føroyar kappingini.

– Eg haldi avgjørt, at føroyskt vinnulív hevur áhuga fyri at koma uppí Prix Føroyar kappingina og promoveringina av føroyskum tónleiki uttanlands. Vinnulívið hevur víst áhuga fyri mentan og at betra frítíðartilboðini her í landinum, og tí er tað upplagt, at vinnulívið verður við í Prix Føroyum. Og síðani er tað kanska ein almenn uppgáva at stuðla hesum arbeiði.

Verður Norðurlandahúsið vertur fyri finaluni í Prix Føroyum um tvey ár?

– Ja, tað rokni eg avgjørt við. Hóast børnini gerast meira sjálvstøðugt, so eru tey altíð vælkomin heimaftur.